**Jørgen Niclasen**
**Jákup Mikkelsen**
**Jacob Vestergaard**
**Jógvan á Lakjuni**
**Annika Olsen**
**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
**vegna Fólkaflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 93/2015: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum** (Yvirtøka av málsøkinum kort- og landmátingarmyndugleiki)

**Uppskot**
**til**
**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum**
(Yvirtøka av málsøkinum kort- og landmátingarmyndugleiki)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 26. mai 2011, verður § 1, stk. 2, nr. 9 strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 29. juli 2016.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Endamálið við hesum lógaruppskoti er formliga at yvirtaka málsøkið kort- og landmátingarmyndugleiki sum føroyskt sermál. Við uppskotinum taka føroyskir myndugleikar lóggávuvaldið og útinnandi valdið á málsøkinum kort- og landmátingarmyndugleiki.

Ein kort- og landmátingarmyndugleiki hevur í stuttum almennu ábyrgdina og uppgávuna at gera geodetiskar uppmátingar og topografiska kortlegging. Í hesum liggur eisini:

- at áseta fyrisett mát ella ein felags standard fyri landafrøðiligar mátingar í Føroyum,
- at fyriskipa regluligar loftmyndatøkur yvir landið,
- at gera lendismyndil fyri landið, og
- at gera myndakort av Føroyum.

Kort- og landmátingarmyndugleikin fevnir ikki um sjókort og sjómátingar, sum eru at rokna sum serstakt málsøki, sí § 1, stk. 2, nr. 18 í lógini um ræði á málum og málsøkjum við seinni broytingum.

Fólkaflokkurin ynskir at yvirtaka økið fyri at seta ferð á og skapa betri fortreytir fyri menning og nýskapandi tiltøkum á kortøkinum. Við yvirtøkuni verður skjøtul settur á eina tilgongd, hvørs endamál er at dagføra og talgilda grundleggjandi korttilfar, sum eftir fáum árum skal verða tøkt hjá almennum sum privatum at brúka ókeypis. Hetta fer at rudda slóð fyri effektivisering innan almenna og privata umsiting og skapar møguleikar fyri nýhugsan og menning av nýggjum vørum og tænastum innan tað privata eins og tað almenna.

Kort- og landmátingarmyndugleikin verður heimilaður Umhvørvisstovuni. Ein orsøk er, at Umhvørvisstovan hevur drúgvar royndir við at gera kort úr loftmyndum. Í 1985 fekk Matrikulstovan sítt fyrsta kortleggingartól, har kort verða gjørd út loftmyndum, og í hesi 27 árini eru flest øll teknisk grundkort og myndakort framleidd á stovninum. Ein onnur orsøk er, at Umhvørvisstovan umsitur onnur nærskyld myndugleikaøki og hevur ment ymsar talgildar skráir, sum eftir ætlan skulu flættast saman á ymsan hátt og síðani latast upp til fría nýtslu. Tí verður mett skilabest, at tað verður Umhvørvisstovan, sum fær ábyrgdina av kortmyndugleikanum, kortgerðini og rakstrinum hesum viðvíkjandi.

Kort- og landmátingarøkið er í dag stýrt av hesum donsku lógunum, sum eru lýstar í Føroyum:

- Lov nr. 82 af 31. marts 1928 om Geodætisk Institut
- Lov nr. 318 af 16. december 1931 angående Geodætisk Instituts trigonometriske stationer m.v.

Eisini eru nakrar kunngerðir lýstar við heimild í nevndu lógum. Eftir ætlan verða donsku lógirnar avloystar av føroyskum lógum skjótast gjørligt eftir, at yvirtøkan er framd. Lógaruppskotini eru gjørd.

Geodatastyrelsen eitur danski myndugleikin, sum higartil formliga hevur umsitið kort- og landmátingarøkið fyri Føroyar. Geodatastyrelsen hevur seinnu mongu árini ikki brúkt nakra serliga orku uppá at dagføra korttilfarið yvir Føroyar ella at talgilda gamalt tilfar frá 1980-90'unum. Tørvurin í Føroyum at dagføra og talgilda korttilfarið stendur tí við og økist.

### Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

Sjálv yvirtøkan kostar ikki landskassanum tað stóra. Danski umhvørvismálaráðharrin hevur í einum fyrispurningi á Fólkatingi í januar 2014 upplýst, at danir bert hava brúkt umleið 100.000 kr. um árið til økið og hevur samstundis eisini havt inntøkur á umleið 100.000 kr. árliga í sambandi við sølu av prentaðum kortum. Hinvegin, so hevur danski myndugleikin heldur ikki raðfest økið, og úrslitið er at vit í Føroyum eru afturútsigld á kortøkinum.

Ætlanin er at uppraðfesta økið. Tí verður tað yvirtikið. Uppraðfestingin fevnir serliga um dagføring, talgilding og frígeving av grunddáta til almenna nýtslu. Henda nýmótansgerð fer at elva til, at almennir stovnar og myndugleikar, kommunur, privatar fyritøkur og tænastuvinnur fáa ein bíligari rakstur, tí tey ikki skulu gjalda fyri atgongd til ymsar talgildar grundupplýsingar, sum longu eru framleiddar til almennar grundskráir. Sum dømi um skráir kunnu nevnast adressuskráin, landsfólkayvirlitið, matrikkulkortið og tinglýsingarskráin. Men samstundis verður tað tó dýrari hjá Umhvørvisstovuni, tí stovan fær ábyrgdina at framleiða talgildar dátur og telduskráir, sum almenningurin so frítt kann brúka.

Meirútreiðslurnar á Umhvørvisstovuni, sum standast av, at kortmyndugleikin verður yvirtikin, og at kortini verða gjørd atkomulig og ókeypis hjá øllum brúkarum, verða spardar

aftur aðrastaðni í almennu skipanini. Sum ítøkiligt dømi kann nevnast, at grundarlag verður ikki longur fyri Føroya Dátusavni, FDS, í verandi líki, og tí fellur tað árliga limagjaldið á 1,5 mió. kr. burtur. Sparingina fáa limirnir í FDS, sum eru Tórshavnar kommuna, Klaksvíkar kommuna, SEV, Føroya Tele, Landsverk og Umhvørvisstovan.

Árligu rakstrarútreiðslurnar hjá Umhvørvisstovuni eru mettar til 1,5 mió. kr., meðan dagføringin (talgildingin) av føroyakortinum er mett til eina stakútreiðslu á 2,25 mió. kr. Verður dagføringin gjørd yvir tvey ár, verður kostnaðurin av kortmyndugleikanum tey fyrstu tvey árini ávikavist 2,5 og 2,75 mió. kr. fyri síðan at falla til ein árligan kostnað á 1,5 mió. kr.

## Kap. 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1**
Við hesi grein verður yvirtøkan framd.

**Til § 2**
Av tí at samráðingar eru millum Umhvørvisstovuna og danska Geodatastyrelsen um at skipa og flyta gamlar kortdátur til Føroya og at gera avtalu um fakligt samstarv fyrstu árini, verður gildiskomudagurin settur til ólavsøkudag 2016, tá fyrireikingarnar væntandi eru komnar undir land ella lidnar.

**Á Løgtingi, 7. mars 2016**

Jørgen Niclasen Jákup Mikkelsen Jacob Vestergaard

Jógvan á Lakjuni Annika Olsen Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur